## TILTØK

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
Frá 24. februar er skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu opin soleiðis:
mánadag, mikudag, hósdag og fríggjadag frá kl. 9-12, týsdag er opið frá kl. 18.30-20.30.
Limir eru vælkomnir inn á gólvið. Tlf. 320197.
teldupostur: lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild,
e-mail:
torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.




**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40, 3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur:
javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
*Grønlandsvegur 58, Tórshavn*
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.
Teldupost: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 444796, Hallbjørg

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c,
Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.00.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

**Føroyingafelagið í Esbjerg**
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

**Føroyingafelagið við fjørðin**
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438 Gudni tlf. 47387748.

**Føroyskt felag í Ballerup**
Ryttergården, Pederstrup
2750 Ballerup

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.

**Føroyingafelagið í Aalborg**
Lille kongens gade 10B,
tlf. 98 13 63 30
email: alaborg@alaborg.dk
Álaborg er opið soleiðis:
Fríggjadag 17-19 og Leygarkvøld 23-03. Álakórið venur mikukvøld kl. 19.30
Annars verða tiltøk hjá felagnum lýst í Túnatos og á heimasíðuni www.alaborg.dk

**Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

**Føroyahúsið í Keypmannahavn**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing: 33231586
Dagliga telefonin: 33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.- frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

**Føroyingar í Noregi**
E-mail:foroyar@norden.no
Heimasíða: http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Teldupostur:
aaarstova@hotmail.com
Reglulig tiltøk: Café mánadag-hósdag kl. 16-18.
Barr leygarkvøld kl. 22-03.
MFS kontórtíð týsdag kl. 17-18.
Kórvening týskvøld kl. 19.30.
Føroyskur barnaskúli ólíka vikur leygardag kl. 11-14.
Sunnudagsskúli líkavikur sunnudag kl. 14.30.
Vit hava eisini fótbólt, flogbólt og badminton. Um hetta hevur tín áhuga kanst tú koma oman í Áarstovu, ella senda okkum ein teldupost og tú fært at vita hvar og nær vit venja. Tú ert altíð vælkomin í hølini hjá okkum, har tú kanst lesa tey føroysku bløðini, fáa ein ókeypis kaffimunn og møta øðrum føroyingum, sum eru í Århus.

**Føroyingafelagið í Svøríki**
Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570.



# Eigarin kann gera tað sama fyri Kall

**Privatiseringin av Føroya Tele hevur týdning fyri Føroya Tele. Fyri okkum kann tað gera tað sama, hvør eigur ein kappingarneyta, sigur Bjarni Askham Bjarnason, stjóri fyri Kall**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Hjá Kall hava tey ikki so góðan hug at gera viðmerkingar til framtíðina hjá kappingarneytanum Føroya Tele.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur sett ein arbeiðsbólk at kanna, hvussu virksemið hjá Føroya Tele skal skipast í framtíðini við atliti at einari einskiljing.

Men hetta er ikki eitt evni, ið fær Bjarna Askham Bjarnason, stjóra fyri Kall, at loypa fram við viðmerkingum.

– Privatiseringin av Føroya Tele hevur týdning fyri Føroya Tele. Fyri okkum kann tað gera tað sama, hvør eigur ein kappingarneyta, sigur ein bersøgin Bjarni Askham Bjarnason.

Vit fangaðu hann á veg niðan á Brúnaskarð, har hann eisini má taka eina hond í, tá ein nýggj GSM basisstøð skal setast upp.

Sum er røkkur GSM kervið hjá Kall høvuðsstaðin og Skálafjørðin. Restina av landinum reikar Kall hjá Føroya Tele. Kall arbeiðir við at røkka størri part av landinum við teirra egna kervi.

Men spurningin um, hvørt Føroya Tele í framtíðini eigur at verða skilt í ein kervis part og ein virkis part, vil Bjarni A. Bjarnason ikki gera nakra viðmerking til.

– Eg havi mína meining um hatta, men hana fari eg ikki út í fjølmiðlarnar við, sigur Bjarni A. Bjarnason.


*So leikandi lætt. Nevndin í Kall fegnast um, at tað hevur higartil spælt væl av hjá felagnum. F.v Òli M. Hansen, formaður, Bjarni A. Bjarnason, stjóri, Jan Otto S. Holm, Halvor Stenvelin Snarvold, Kristian Davidsen og Oskar Magnusson* Mynd: Jens Kristian Vang

### Væl nøgdur

Stjórin fyri Kall letur væl at gongdini hjá fyritøkuni fyri farna árið. Ársúrslitið vísti eitt undirskot áljóðandi 7,5 mió. kr.

Men hetta er Bjarni Askham Bjarnason, stjóri, væl nøgdur við.

– Vit eru stak væl nøgdir við árið í fjør. Vit hava fingið ein størri marknaðarpart, enn vit høvdu roknað við, sigur Bjarni Askham Bjarnason.

Kall hevði ikki roknað við einum yvirskoti í fjør, og roknað verður heldur ikki við, at 2003 fer at geva eitt tal hinumegin null á niðastu linju.

Tað er serliga gongdin á fastnetinum, sum Bjarna Askham Bjarnason og hini ellivu starvsfólkini hjá Kalli at smírast. Marknaðarparturin liggur omanfyri tjúgu prosent, og hetta ger, at hesin parturin av virkseminum javnvigar.

Men kostnaðurin av íløgum, marknaðarføring og at hála fyritøkuna upp í ferð á marknaðinum ger, at Kall framvegis hevur eitt undirskot.

Samlaða undirskotið hjá Kalli frá virksemið byrjaði í 2000 hevur verið 19,2 milliónir.

Góðar 35 milliónir vórðu settar í av fyrstan tíð, og eginpeningurin hjá felagnum liggur um sekstan milliónir, soleiðis at Kall er væl fyri, metir Bjarni A. Bjarnason.

Í 2002 fór Kall undir GSM virksemi við prepaid Frælsi í dós. Í tíðindaskrivi skrivar Kall, at teirra marknaðarpartur her liggur um tíggju prosent.

Í ár er Kall farið undir at bjóða GSM hald, og stjórin metir, at marknaðarparturin í skrivandi stund liggur um 13–14% av samlaða marknaðinum.

– Nú skulu vit fáa raksturin at bera seg, sigur Bjarni A. Bjarnason, tá spurt verður eftir, hvørjar ætlanirnar eru fyri hetta árið.

Kall fer framhaldandi í ár at satsa upp á GSM og fastnet. Produktir sum eitt ADSL liggja eitt sindur longri burturi, metir stjórin. Størsti partaeigarin í Kalli er Framtaksgrunnur Føroya.

# Fjølboytt vikuskifti í Runavík

TÍÐINDASKRIV

Komandi vikuskifti 4.–6. apríl koma væntandi nógvir gestir til Runavíkar kommunu. Hetta er vikuskifti tá Føroya stórsta bústevna »Hús & Innbúgv« verður hildin í Ítróttarhøllini í Runavík, umframt í einum telti, sum er sett upp við síðuna av høllini. Umframt at vitja bústevnuna, hava gestirnir eisini møguleika at keypa inn allan leygardagin. Og tá tað er gjørt kann ferðin setast niður við at vitja forngripasavn og málningaframsýning.

### Langur leygardagur

Handlarnir í Handilsmiðdeplinum í Runavíkar Kommunu hava avgjørt at hava langan leygardag. Tað merkir at opið verður til kl. 17.00 leygardagin 5. apríl.

Bygdasavnið Forni hevur opið.

Møguleiki er hjá vitjandi á bygdasavninum Forna á Glyvrum at síggja eina serliga myndaframsýning hongur uppi í løtuni. Hetta eru myndir av ymiskum fiskaarbeiði bæði á sjógvi og landi. Haraftrat er tann fasta framsýningin, har ymiskir fornlutir eru at síggja, so sum innbúgv, brúkslutir, amboð og mangt annað. Opið er leygardag og sunnudag frá kl. 16.00 til kl. 20.00.

### Málningaframsýning

Í gamla handlinum á havnalagnum í Saltangará fara Ketty á Fríðriksmørk av Strondum og Dagmar Beder av Kambsdali at sýna fram málningar. Gamli handilin, ofta nevndur Piddasa handil, hevur av og á verið karmur um líknandi tiltøk, og fara listakvinnurnar at hugna um og seta sín dám á. Opið er leygardag og sunnudag frá kl. 16.00 til 20.00.


*Piddasa handil*

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Hósdagin 03.04. kl. 20[00]
Hósdagin 03.04. kl. 22[15]



Hósdagin 03.04. kl. 22[00]



Hósdagin 03.04. kl. 19[00]
*– Seinasta sýning*

KOMANDI FILMUR



Frumsýning
Fríggjadagin 04.04.

P BIO P
KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu